# Kashmir spæla á G! Festivalinum

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi, um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk av suðri. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Um morgunin andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn, men fyrrapartin støkkur hann vesturum til útsynning og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í stívt andøvsgul av vestri og ælingur. Hitin upp í 13 stig. Týsdagin minni vindur av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Vælumtókti danski rokkbólkurin, Kashmir, verður at síggja á Gøtusandi í summar.**

G! FESTIVALURIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Mom´s in Love, Daddy´s in Space. Rocket Brothers. The Aftermath. Miss you. Lambshade. Flestu fjepparar hjá danska rokk-bólkinum, Kashmir, mugu kenna hesi løgini í svøvni. Fjepparanir og onnur við teimum fáa nú ein gyltan møguleika at hoyra vælumtókta rokkbólkin í Føroyum.

Fyriskipararnir av G! Festivalinum siga, at avtala er komin í lag um, at Kashmir verður eitt av høvuðsnøvnunum á Gøtusandi 17.–18. juli í ár.

–Vit eru ótrúliga fegnir um, at Kashmir hevur játtað at spæla á festivalinum í ár. Talan er um størsta rokkbólk í Danmark, og bólkurin fer at geva festivalinum enn størri tyngdgleða. Vit hava tosað við teir seinastu vikurnar, og nú er tað mesta komið í rættlag, greiðir ein fegin, Jón Tyril, frá.



### FAKTA

**Fløgur hjá Kashmir:**
Travelogue-1994
Cruzential -1996
The Good Life-1999
Home Dead -2001
Zitilities-2003

**Manningin:**
Kasper Eistrup, sang og gittar
Mads Tunbjerg, bass
Asger Techau, trummur
Henrik Lindstrand, ljómborð og gittar

### Byrjaðu í 1993

Kashmir hevur 11 ár á bakið. Teir byrjaðu í Keypmannahavn í 1993, og bólkurin hevur áhaldandi ment seg nógv seinastu 11 árini. Bólkurin verður mettur at vera millum fremstu nøvnini innan danskan rokk-tónleik.

Á altjóða tónleikapallinum hava teir eisini gjørt vart við. Kashmir er javnan at hoyra á tónleikarásini, MTV. Gjøgnumbrotið fekk bólkurin við fløguni, The Good Life, frá 1999, sum fekk eitt ótal av virðislønum. Nýggjasta fløgan, Zitilies, hevur eisini fingið fleiri danskar grammy-virðislønir.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 4 |
| Nuuk | 3 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 20 |
| London | 22 |
| Tromsø | 8 |
| Bergen | 14 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 12 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 14 |
| Bukarest | 14 |
| Paris | 29 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 27 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 36 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | – |
| Sydney | 19 |
| New York | 32 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1006 hPa. við Bergen fer eystureftir. Eitt brúgvalag við Føroyar fer spakuliga norðureftir.




Lágtrýstið við Hetland fer eystureftir og dýpist. Ein hátrýstryggur sunnan fyri Ísland verður yvir Føroyum leygarmorgunin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 09/06 kl. 06[00]– 10/06 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 7,8°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° - Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 10,0 mm – mált frá 09/06 kl. 06[00]–10/06 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 50,5 mm

www.sosialurin.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

3. juni: Mánin næstur jørðini
9. juni: Seinna kvarter
17. juni: Tendring/Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 11. juni | 02.51 | 15.16 | 01.51 | 14.16 | 02.06 | 14.31 | 04.51 | 17.16 | 05.51 | 18.16 | 01.06 | 13.31 | 00.06 | 12.31 | 03.06 | 15.31 | 04.06 | 16.31 | 02.36 | 15.01 | 03.51 | 16.16 |
| 12. juni | 03.32 | 15.57 | 02.32 | 14.57 | 02.47 | 15.12 | 05.32 | 17.57 | 06.32 | 18.57 | 01.47 | 14.12 | 00.47 | 13.12 | 03.47 | 16.12 | 04.47 | 17.12 | 03.17 | 15.42 | 04.32 | 16.57 |
| 13. juni | 04.13 | 16.38 | 03.13 | 15.38 | 03.28 | 15.53 | 06.13 | 18.38 | 07.13 | 19.38 | 02.28 | 14.53 | 01.28 | 13.53 | 04.28 | 16.53 | 05.28 | 17.53 | 03.58 | 16.23 | 05.13 | 17.38 |
| 14. juni | 04.55 | 17.20 | 03.55 | 16.20 | 04.10 | 16.35 | 06.55 | 19.20 | 07.55 | 20.20 | 03.10 | 15.35 | 02.10 | 14.35 | 05.10 | 17.35 | 06.10 | 18.35 | 04.40 | 17.05 | 05.55 | 18.20 |

5 707265 100050 >